TILTØK

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30: Minnismáltíð Harrans. Kl. 18.00: Cathy og Jógvan Júst Rasmussen og Heidi Guttesen, trúboðarar á Filipsoyggjunum, tala og greiða frá. Regin Guttesen syngur.

Adventkirkjan
Leygardagin kl. 10.00: Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Harrin, rættvísi okkara. Kl. 11.00: Gudstænasta við J. V. Danielsen.

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit. Hóskvøldið kl. 19.30 Meinigheitskvøld í Mariukirkjuni. Emne: Fremmedreligionernes udfordring til kirken af i dag. Foredrag v. pastor Benny Blumensaat, om de kristnes ansvar og opgave i et multireligiøst samfund. Øll eru hjartaliga vælkomin. Leygardagin kl. 11.30 Orðsinstænasta við Kommunión í Kerit. Sunnudagin kl. 11 hámessa við Benny Blumensaat í Mariukirkjuni.

Rhema á Hálsi
Fríggjakvøldið onki A.T.A.P. kids vegna summarfrí.
Sunnudagin kl. 11 møti.

Kirkju- & missiónshúsið á Argjum
Sunnudagin 8. juli kl. 17.30 bønarløta og kl. 18.00 møti v/ Jógvan og Dagny Højgaard.

Ebenezer
Fríggjakvøldið kl. 20.00: Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11: Breyðbróting, kl. 18.00: Evangelískt møti og kl. 21.00: Útimøti.

Meinigheitshúsið
Leygardagin kl. 16.30 bønarløta – kvinnur.
Sunnukvøldið kl. 18 møti við Suna Johannesen.

Filadelfia, Landavegur 22
Í kvøld kl. 21 ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17 landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti v/ Sam Jacobsen, kl. 18 kvøldmøti v/ Sonna Djurhuus, kl. 22 útimøti v/ Evangeliihúsinum.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 18 evangelískt møti.

Samkoman Immanuel
Í kvøld kl. 20: Kongsins Herlið. 8 ár og eldri eru vælkomin.

Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin í Hoyvíkar skúla: Eingin sunnudagsskúli vegna summarferiu. Kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti við Egin og Oddmar. Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti hjá Elin og Símun, Flatnagerði 10 A. Øll eru vælkomin.

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Heimasíða okkara: www.koma.fo

Filadelfia, Sundalagið
Sunnukvøldið kl. 18 kvøldmøti v/ Sam Jacobsen.

Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 11: Morgunmøti við Jón Miðberg. Mánakvøldið kl. 20: Bíbilog bønarmøti.

Keldan í Skálafirði
Fríggjakvøldið kl. 20.30: Vón fyri framman við hugna, vitnisburði og sangi. Evan Jakobsen luttekur.
Leygarkvøldið opið hús kl. 21 við Eyðun Jacobsen. Sunnukvøldið møti kl. 19 við Egil Toftegaard. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

Lívsins Orð
Møti verður sunnudagin kl. 10.30 v/ breyðbróting. Øll eru vælkomin.

Ørkin, Saltangará
Evangeliskt møti verður sunnudagin kl. 19.00 í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini, Saltangará. Gestatalari luttekur. Húsmøti verður týskvøldið kl. 20.00 hjá Anthony & Charles Johansen, Saltangará.
Øll hjartaliga vælkomin.

Betania í Skopun
Leygarkvøldið verður útimøti kl. 21.30. Sunnudagin kl. 11 morgunmøti.
Frítór Debes talar. Sunnukvøldið kl. 18 útimøti.
Mánakvøldið kl. 20: Bønarmøti.
Øll eru vælkomin.

Soli Deo Gloria
Leygarmorgunin kl. 09 bøn saman við Getsemane. Sunnudagin kl. 18 møti. Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnukvøldið verður møti kl. 18 við Nimrod og Ebbu. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Vági
Møti verður sunnukvøldið kl. 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Lymføðemfelagið
Postrúm 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 13-15.00 á tlf. 212380.

Felagið Tórshavn
Útferð út í Hest sunnudagin 8. juli. Farið verður av Farstøðini kl. 8.20 og av Gomlurætt kl. 9.00. Tilmelding á Kunningarstovuni.

Tilhaldið í Tórsgøtu 21
Frá 3. juli til 17. august er Tilhaldið opið mánadag-fríggjadag kl. 14.00-18.00.
Á ólavsøku 27., 28. og 29. juli kl. 14.00-18.00 verður framsýning av listaverkum hjá Fridtjoffi Joesnen á 1. hædd og í kjallaranum verður framsýning av úrvali av klæðum frá SIRRI. (Suðuroyar Ullvirki)
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundir verða í kvøld kl. 20-21.00 og kl. 22.30-23.30.

Al-anon
fundur er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 á Vaskarínum í Tórsgøtu 5.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Fundir eru í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri)

Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304

Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn
hevur summarfrí frá 28.6. til 3.9.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin mánadag kl. 14-18 og hósdag kl. 14-20. Telduposturlisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International
Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

Føroyskir fiskimenn
uttanlands, tlf. 21 04 95. Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

MBF
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00. **Vit hava stongt vegna summarfrí frá 5. juli til 15. august.**
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail: mbf@post.olivant.fo

Javni
Skrivstovan er stongd vegna summarfrí. Ringjast kann til ein av nevndarlimunum.
Eirikur Dam, tlf. 422087
Jógvan Elias á Løgmansbø, tlf. 317686
Jarvin Feilberg Hansen, tlf. 320237
Malena Arnholdsdóttir, tlf. 441395
Diana í Puntabyrgi, tlf. 316510 – fax 310557
email: punta@post.olivant.fo

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir. Tlf./fax 312098
Telduposturfar_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

Giktafelag Føroya
Skrivstovan er stongd í summarfrítíðini. Lýst verður tá opið verður aftur.

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo heimasíðan: www.deaf.fo

Cøliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum:
Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

Nýrafelagið
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið
Íslandsvegur 10c
Tlf./fax 311419

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 31 79 59,
telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 317978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

Sjómansheimið Ørkin í Reykjavík
Møtini byrjaðu 1. oktober kl. 16 og verða hesa klokkutíð allan veturin.

Føroyingafelagið í Esbjerg
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg,
tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

Føroyingafelagið í Odense
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C. Tlf.: 25395563
Telduposturffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

Føroyingafelagið við fjørðin
Jægerspris. Vit hava ymisk tiltøk nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið, ella lokalt, so ring til Fríði tlf. 47317438
Gudni tlf. 47387748

Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Telduposturfo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum. Opið er: Mánadag, týsdag og hósdag kl. 11.30-15.30, mikudag kl. 14-18, fríggjadag stongt (donsk tíð).

Føroyingafelagið í Århus
Vestergade 48D
8000 Århus C
Tel. 86 18 06 04
Húsið er opið mánadag til hósdag kl. 16-18 og fríggjakvøld kl. 21-03. Føroysku bløðini liggja frammi. Kaffi er ókeypis. Flogbóltur í Frydenlundskúlanum fríggjadag kl. 16-18. Sunnudagsskúli annanhvønn sunnudag (líka vikur) kl. 14.30. Føroyskur barnaskúli annanhvønn leygardag (ólíka vikur) frá kl. 11-14.

Evangeliska Røddin
Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Føroyingafelagið í Svøríki
Vit hava tiltøk nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Annu Westfahl á tlf. +46176269536 ella Innu Törnroos á tlf. +468853570

Føroyskt barnamøti
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fælleshuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Sørin Danielsen, tlf. 56147684 ella Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

BRÚDLEYP

Í dag, 6. juli, kl. 16.00 giftast í Fuglafjarða prestagarði Laila Holm, Nólsoy og Bennie Højgaard, Fuglafjørður. Dagurin verður hildin saman við familjuni. Opið hús verður í heiminum leygarkvøldið frá kl. 19.00.

FILMSTEIGURIN

Evolution

Snýr seg um tað kaosið, sum verður, tá ein meteorur rakar jørðina. Meteorurin hevur ein fremmandan lívshátt við sær, sum gevur orðatakinum "tann sterkasti klárar seg" ein heilt nýggjan týdning.

Teir báðir vísundamenninir, Ira Kane (David Dechovny) og Harry Bloch (Orlando Jones) sleppa til staðið, at metorurin er fallin á jørðina og staðfesta, at meteorurin »bløðir«, og skjótt birtist ein lívsformur, sum skjótt nørist – uttan sex. Í fyrstanini tykist hetta lítið og meinaleyst. Men tá ein mýggjabitakend vera treingir inn í Harry, verður teir greiðir yvir, at hesir aliens kanska eru eitt sindur ágangandi, eins og Harry fær at kenna týdningin av glíðikremi í tí, fyri hann, desperatu støðuni.

Áðrenn langt um líður breiðir hesin alien-kendi lívsháttur seg sum ein steppueldur, og tær rættuliga ymisku rúmdarverurnar vaksa seg stórar og álopshugaðar. Ira og Harry fáa tí sameina seg við Wayne (Seann William Scott), sum upprunaliga fann meteorin, og vísindaliga umboðsmannin hjá stjórnini, Alison (Julianne Moore). Hon hevur ikki so stóra respekt fyri Ira at byrja við, men finnur skjótt út av, at tað helst er best at samstarva, serliga tí at herurin ger alt fyri at forkludra alt, og guvernørurin (Dan Akroyd) sjálvsagt er við at missa tolið…

Bagger Vance

Ein søga um at endurfinna meiningina og gleðina við lívinum!

Vit eru í Savannah í tríatiárunum. Rannulph (Matt Damon), er ein lokal golfstjørna, kemur desillusioneraður aftur eftir fyrra heimsbardaga. Eftir 10 ára flakkan kring um vendir hann aftur til heimbýin, har hann hitti Adele (Charlize Theron), hvørs hjarta hann hevur knúst við at vera so leingi burtur. Hon fær yvirtalað hann til at umboða býin í einari stórari golfkapping. Rannulph finnir hjálp hjá Bagger Vance (Will Smith), ein duldarfullur fremmandamaður, sum hjálpir honum í royndum hansara at endurfinna "tað perfekta slagið", bæði í lívinum og í ítróttinum…

Bounce

Tann smarti og sjarmerandi Byddu (Ben Affleck) er partnari í einum av teimum kendastu reklamufyritøkunum í Los Angeles. Viðskiftafólk hansara elska hann og tað gera allar kvinnur, hann hittir, eisini vegna hansara "good looking". Lívið er herligt, til ta kvøldið í desember, tá hann vegna ógvusligt kavaveður, stranda á flogvøllinum í Chicago.

Her hittir hann Greg Janello (Tony Goldwyn) og tað vøkru forrætningskvinnuna úr Miami (Natasha Henstridge). Greg roynir at koma heim við einum flogfari fyrr at kunna halda jól saman við konu og tveimum børnum teirra.

Av reinari hjálpsemheit – og fyri at fáa eina nátt saman við tøi vøkru og sexutu Mimi – letur Buddy honum boardingpassið. Næsta morgun finnir Byddu út av, at flogfarið er dottið niður. Og fyri fyrstu ferð í lívinum veit Buddy ikki, hvat hann skal gera. Hann søkkur enn longur niður í sprittmjørkan, sum hann longu hevur flirtrað við. Tá hann meldar seg hjá Anonymum Alkoholikarum sær hann, at eitt av trinunum í avvenjingarprogramminum krevur, at man sigur orsaka til teirra, man hevur sært við drykkiskapinum. So eftir eina stund fer Buddy til Abby (Gwyneth Paltrow), einkjuna eftir flogdøttin, og áðrenn tey sjálv vita tað, fella tey fyri hvørjum øðrum. Trupulleikin er bara, at Buddy ikki hevur sagt hennik at hann á ein ella annan máta hevði ábyrgdina av, at maðurur hennara doyði. Men Abby finnir út av, at teirra fyrsta møti ikki var so óskyldugt og tilvildarligt, sum hon helt…

Fríggjadagin 06.07. kl. 21[00] Fríggjadagin 06.07. kl. 23[30]
- Frumsýning -
Leygardagin 07.07. kl. 21[00] Leygardagin 07.07. kl. 23[30]
Sunnudagin 08.07. kl. 20[00] Sunnudagin 08.07. kl. 22[00]

HAVNAR BIO
☆ Tlf. 3119 56 ☆

Fríggjadagin 06.07. kl. 20[30] Leygardagin 07.07. kl. 20[30]
Sunnudagin 08.07. kl. 19[30]



Fríggjadagin 06.07. kl. 23[00] Leygardagin 07.07. kl. 23[00]
Sunnudagin 08.07. kl. 22[00]

☆ BIO KIOSKIN ☆
Heitt PopCorn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm is - o.m.a.

www.in.fo/havnarbio - www.in.fo/havnarbio - www.in.fo/havnarbio - www.in.fo/havnarbio - www.in.fo/havnarbio